


*Nr. 1* *8. januar 2017* *77. árg.*

# Opnar dyr

*„Sí, eg havi latið dyr standa opnar fyri tær, sum ongin er mentur at lata aftur.“ Opb. 3,8.*

So sleppa vit altso aftur at seta hol á eitt nýtt ár. Hvussu tað so fer at skikka sær, er tað ongin av okkum, sum veit nakað sum helst um – heldur ikki, hvat vit fara at ganga okkum framá hesar næstu vikurnar.

Men uttan at vilja spæla profetur, so haldi eg meg trygt tora at siga, at millum mangt, mangt annað, okkum fer at vera fyri, fara at vera dyr av ymiskum slagi, sum vit fara at ganga okkum fram á, eisini dyr, sum ymiskt er skrivað á.

Á summum teirra stendur kanska at lesa: „opið frá 9-5, stongt leygardag.“ Á øðrum: „ongin atgongd fyri ørindaleys.“ Og á øðrum stutt og greitt: „atgongd bannað!“

Og so stendur tú har við hárinum niður eftir bakinum og við eini undarligari kenslu av at vera uttanfyri – at vera óynsktur – her hevur ongin brúk fyri tær – her er ongin hjálp at heimta.

Og so allar tær hurðar, sum vit menniskju sjálv skumpa aftur hvør fyri øðrum, við hjartakulda og líkasælu okkara.

Ongantíð hava vit menniskju livað **so tætt** upp at hvør øðrum sum í dag, og so kanska ongantíð **so fjart** hvør frá øðrum sum júst í dag – vegna tær nógvu stongdu hurðarnar, sum vit sjálv læstu. Hvør hevur sínar. Mørk, vit ikki sleppa um. Byrgingar, ið treingja saman um okkum.

Her gerst so onki?

Jú, tað gerst, - tí tað er ein , sum hevur sagt og blívur við at taka tað uppaftur: „**Eg** havi latið dyr standa opnar fyri tær, sum **ongin** er mentur at lata aftur!“

Kanska hetta lítla brotið, eg onkuntíð havi lisið, dugir betur at siga tær nakað um hetta, enn eg dugi tað.

Har sat ein gomul mamma einsamøll. Allir tankar hennara og alt stríð hennara hevði snúð seg um hetta eina: at sonurin, ið var alt, hon átti, skuldi fáa best møguligu skúlagongd og blíva til nakað her í verðini, sum hon plagdi at siga við seg sjálva. Og hann var blivin til nakað. Eydnan hevði verið honum holl í stórstaðnum. Pengar hevði hann vunnið, og konu við, sum hevði uppaftur fleiri.

Og mamman? – ja, hana gloymdi hann, - til ein dag kom á hann slíkur longsul at síggja hana aftur. Tveir dagar var hann á ferð, og so stóð hann aftur í teim gomlu, smáu stovunum og upplivdi aftur nakrar tímar barndómsins sælu. Tá ið so kvøldið kom, fór hann at gera seg til reiðar at fara, skuldi hann náa inn til hotellið í stórbygdini at gista. „Gista?“ segði mamman, - „gista kanst tú jú her!“ Hann hugdi uttan um seg í teim fátæku stovunum. „Ja! men tú ert jú ikki fyrireikað at hava náttargest.“ „Jú!“ – og so læt hon upp dyrnar inn í gamla kamar hansara. Har stóð songin reidd.

„Íðan, tú visti jú ikki, at eg fór at koma í dag..“

„Sonur mín,“ svaraði hon, **„hvønn dag, øll hesi árini** havi eg væntað teg!“

Tað var nakað av hesum, hetta stykkið fegið vildi sloppið at mint teg um og givið tær við inn í nýggja árið – kanska eitt ár, tú stúrir fyri at fara í holt við, tí har er nakað í tí – nakað við eini stongdari hurð.

Ja, kanska, - men so eisini nakað við eini **opnari**. Tað hava vit Jesu egnu orð fyri.

Har ert tú ikki bara vælkomin.

Har ert tú beinleiðis **væntaður!** *J. Weihe.*

---

Fyrr í tíðini ballaðu tey einki inn, tey søgdu tað hart og hvast. T.d. segði William Booth, stovnari Frelsunarhersins, sum gekk runt og hjálpti alkoholikarum: “Eg biði, at hvør einasti av offiserum mínum má vera í helviti í 10 minuttir, tí so sær hann, hvussu sær út inni har, og tískil vil hann restina av ævi síni boða Kristus og bjarga menniskjum frá hesum.”

*e.c.* ums.

# Guds fólk er vónarfólk

*Lovaður veri Gud og faðir várs Harra Jesu Krists, sum eftir miklu miskunn síni hevur endurføtt okkum til livandi vónar fyri uppreisn Jesu Krists frá deyðum. 1. Pæt.1,3.*

Vón! Eitt vælsignað orð, ein vælsignað gáva, sum vónarinnar Gud hevur sent okkum! Vit kristnu eiga eina livandi vón, sum vit eru endurfødd til fyri uppreisn Jesu Krists frá deyðum. Guds fólk er vónarfólk. Eisini undir vónini býr gleði, og tí er Guds fólk eisini gleðifólk. Bíblian upplívgar ferð eftir ferð við hini bjørtu vónini og eggjar alsamt Guds børnum at gleðast í Harranum og frøast í vónini.

Vónin er ein máttmikil upphevjandi kraft í kristnilívi okkara. Í orðinum stendur eisini, at trúgv okkara er eisini vón til Guds. Vónarkraft er altíð virkin, tí at tað er ein livandi vón. Soleiðis hevur verið frá upphavi, og soleiðis verður, til dagarnir eru uppi.

Hinar gomlu trúarhetjurnar livdu í vónini og trúðu við vón móti vón. Virksemið hjá profetunum gjørdist tí ógvuliga týdningarmikið, tí tað kveikti vón í fólkinum og helt hesa vónina livandi. Vónin um lætta, um hin fyrijáttaða Messias, um hina dýrdarríku framtíðina. Eisini ápostlarnir livdu livandi í vónini, og vónin kveikti í teimum treysti og bergfasta trúgv.

*t.* týddi.

# Dólskni førir til deyða

Í kommunistatíðini var Aril Edvardsen einaferð yviri í Russlandi og prædikaði. Ein russi, sum var tolkur hansara, fylgdist allan vegin við honum yvir til Vladivostok. Tá ið teir skuldu skiljast, kom ein neyð niður yvir Aril fyri hesum ófrelsta manni. “Hetta verður helst síðstu ferð, at eg síggi hann. Eg má siga okkurt við hann,” hugsaði hann.

„Hevur tú hoyrt um Nóa?” spyr Aril so. Jú tað hevði hann.

„Veitst tú, at Nóa læt byggja eina ørk?” Ja, tað visti hann.

„Allir timburmenninir, sum hjálptu Nóa at smíða ørkina, hoyrdu hann prædika øll árini, til ørkin stóð liðug. Men eingin

teirra tók við ávaringini og boðskapi hansara. Tvørturímóti hildu teir hann vera ein ørvitisknokk, sum smíðaði eitt so stórt skip so langt inni í landinum, og teir flentu at honum. Tískil druknaðu allir teir, sum høvdu hjálpt honum at smíða. - Nú hevur tú ferðast um alt landið og hoyrt meg prædikað. Tað er ikki nóg mikið at hoyra og duga boðskapin uttanat. Tú mást gera okkurt við tað. Tú mást bjóða Jesusi at koma inn í títt hjarta. Hann er okkara frelsandi ørk. Gert tú ikki tað, so verður tað við tær sum við smiðunum á Nóa døgum."

Hvussu tað bleiv við hesum tolkinum, veit eg ikki. Men Jesus ávarar okkum. „Sum tað var á Nóa døgum, skal tað verða í endatíðini," segði hann

Vit bíða eftir burturrykkingini. „Eingin burturrykking hevur nakrantíð verið fyrr," flenna fólk speirekandi.

Jú, Enok varð burturryktur, og Elia varð burturryktur, og skjótt kemur triðja burturrykkingin, tá ið øll tey trúgvandi verða tikin burtur av jørðini, og tá verður tað ikki stuttligt at vera latin eftir, tí tá kemur ein trongdartíð, sum henda verð ongantíð hevur sæð makan til.

Men enn er náðitíð, og enn er frelsudagur, og Skriftin sigur, at um tú hoyrir Harrans kallandi rødd, so skalt tú taka ímóti honum í dag.

Tá kemur tú, andaliga talað, at búgva á Rómerjavegi nr. 8 í fyrstu hædd, tí: „So er tá nú eingin fordøming fyri tey, sum eru í Kristi Jesusi." Róm. 8,1.

*Effie Campbell* umsetti.

**Sunnudagsblaðið**

*ynskir øllum eitt av Harranum signað nýggjár!*

*Heilsan Blaðstjórin*

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á føroyskum, donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74




*Nr. 2* *22. januar 2017* *77. árg.*

# Guds miskunn varar allan dagin

*Sum dagar tínir skal styrki tín vera. 5. Mós.33,25b.*

Hetta eru góð orð at hava við okkum inn í nýggja árið. Latið okkum fyrst festa okkum við, at her stendur ikki ár, men dagar. Ikki eina óyvirskoðiliga framtíð, men hvønn einstakan dag – dagin í dag. Gud gevur okkum ikki tveir dagar í senn, ikki eingang tveir tímar ella tvær løtur í senn, og hetta skuldi gjørt lívið so mikið einfaldari hjá okkum, um vit bara vóru nøgd við tað, og tað áttu vit at gjørt og verið nøgd við, at so er.

Og so gjørdist tað nógv lættari at rokna við Gudi og hjálp hansara. Tí vit eiga øll at kunna trúgva, at hann hevur mátt at halda okkum uppi – latið okkum siga í fimm minuttir, og at hann í hesar fimm minuttirnar er førur fyri og eisini villigur at varðveita okkum frá synd, at stýra hjarta og hugsanum okkara og hava tamarhald á huga og vilja okkara. Ja, hetta halda vit, at vit mugu kunna trúgva! Men um vit nú siga tíggju minuttir, megnar Gud so at gera tað sama tá, ella ein tíma? Og um hann megnar tað, so kann hann heilt vist gera tað næsta tíman, tí hann er altíð tann sami. Og hví skuldi tað verið liðugt bara eftir tveimum tímum?

Sí, hvussu einfalt tað verður at rokna við Gudi, um vit bara rokna við honum eina løtu í senn, og meira nýtist okkum jú ikki.

Og so lovar hann, at styrki okkara skal vera sum dagar okkara, tað merkir sum dagsins tørvur. Og her er ongin avmarking og ongin tiltaksmegi, um dagurin skuldi blivið meira enn vanliga fullur av royndum. Nei, ongin av dagsins byrðum er so tung, at

tann Altvaldandi ikki maktar hana, tí at her er loyndarmálið: **hann vil bera byrðarnar við okkum.** Legg tú á Harran tað, sum tyngir teg, so heldur hann tær uppi.

Og halda vit, at tað er trupult at hugsa okkum í tí støðu at møta einum heilum degi við roynslum, ella kanska mongum tungum døgum og árum. Tá mugu vit minnast til, at vit hava ikki loyvi til frammanundan at leggja á okkum sjálvi tungar byrðar og royna at bera tær, um tað so bara er í tonkunum. Tí ongin kann við at stúra leggja eina alin aftur at lívi sínum. Men vit eiga hvørja løtu at leita fram fyri Gud í trúgv og áliti á hansara kærleika og óbroytiligu náði og við friði hansara í hjørtum okkara. Hvat ið síðani kemur um stutta tíð ella í eini fjarari framtíð, tað vita vit onki um, og tað nýtist okkum heldur ikki at vita. Men tað, sum okkum harafturímóti altíð tørvar at vita, er hetta eina neyðuga: **sum dagar tínir skal styrki tín vera.**

Og við styrkini kemur hvíldin, og við hvíldini fylgir tryggleiki. Høvdu vit kunnað upplivað nógvar slíkar dagar í árinum, sum nú liggur framman fyri okkum! Ja, Guds vilji er, at hvør dagur skal vera soleiðis, **men aldri meira enn ein dagur í senn.** Og er tað ikki nóg mikið?

# Vit vænta Jesus

*Tí at borgaraskapur okkara er á himnum, haðan sum vit eisini vænta sum frelsara Harran Jesus Kristus. Fil. 3,20.*

Vit vænta sum frelsara Harran Jesus Krist, sum skal umbroyta. Sanniliga, tað verður ein umbroyting, tá ið Jesus kemur. Ongin heimskollvelting kann nær námind skapa hesa umbroyting, sum Harri okkara og frelsari einsamallur skapar, tá ið hann kemur aðru ferð.

Sí, hann kemur í skýggini! Hann kemur í dýrd og kraft. Hetta er livandi vón teirra kristnu. Vit trúgva, at hann kemur, og vit bíða eftir afturkomu hansara. Kanska kemur hann í dag, kanska í morgin, kanska ikki fyrr enn um mong ár. Men vit vita, at hann kemur, og vit vænta hann hvønn dag.

Sterkari væntan okkara er, ríkari og djúpari er kristnitrúgvin.

Jesus kemur sum sigursharri og dómari. Hvørt eyga skal síggja hann, eisini teir, sum hava gjøgnumstungið hann.

Tá verður hin stóra uppgerðin og dómadagur. Tá fara øll, sum hava staðið ímóti honum, at gráta og gremja seg – men øll, sum trúgva á hann, fara at frøa seg í eyðmjúkari gleði, tí at øll hini trúgvandi tekur hann við sær inn í hina ævigu dýrdina.

Harrin gevi okkum øllum ta náði og tann frið, sum vit bara fáa til ognar, tá ið vit eiga hina livandi hjartatrúnna á hann, sum er, og sum var, og sum kemur!

*t.* týddi.

# Ver trúgvur móti skriftunum

*„Øll skriftin er innblást av Gudi ...“ 2. Tim. 3,16. V.D.*

Fyrsta villleiðingin og lokabragdið, ið skrivað er um, er tað, har Satan, klæddur í slangubúna, vissar Evu um, at Gud meinar ikki rættiliga tað, sum hann sigur. Satan brúkar enn sama framferðarhátt.

Tú sært tað í pástandum sum hesum: „Um tú bara ert sannur og reinmeintur, so hevur tað einki at siga, hvønn ið tú trýrt uppá.“ Hvat nú, um hetta er eitt álvarsligt mistak? Um bremsurnar á bilinum ikki rigga, so man títt sannføri neyvan fáa bilin at steðga - tað fer harafturímóti ein telefonboks ella onkur tilvildarligur bygningur at syrgja fyri.

„Vit mugu ansa eftir ikki at særa nakran ella gera tey firtin.“ Hvat nú, um fólk ikki brýggja seg um at hoyra sannleikan ella at liva í samsvari við hann? Skuldu vit so umskrivað ella lagað Skriftina eftir tí, sum vit orka at hoyra? Hevði tú ikki, um eldur skuldi komið í, vakt tey, tú elskar, so tey ikki svóvu seg inn í eina vanlukku?

Summi siga: „Bíblian rúmar einum sannleika, men ikki øll Bíblian er sonn.“ Paulus skrivar, at „Øll skriftin er innblást av Gudi ...“ 2. Tim. 3,16 V.D. Og Jesaja sigur: „Men tey, sum siga soleiðis, trilva í myrkri.“ Jes. 8,20 (donsk ums.) Ein metur er hundrað sentimetrar - soleiðis er tað vorðið. Ávís ting standa rimmarføst. Annars høvdu vit verið givin upp til skutils mótvegis tulkingunum hjá hvørjum øðrum, og vit høvdu verið offur

fyri virðismetingini hjá øðrum - og tá hevði onkur verið fyri vanbýti.

Støðan er tann, at Kristi søk líður, og tey andaligu svongu menniskjuni halda áfram at svølta, um vit hástór siga teimum sannleikan. Vit, sum hava fingið náði og miskunnsemi, mugu vísa øðrum tað við; men latið okkum ikki linka krøvini og gera eina neyðsemju mótvegis tí, sum Guds orð sigur. Tað er áhugavert, at meginparturin av ungum fólki í aldrinum 16-29 ár fyri stuttum í einari spurnarkanning søgdu: „Lat meg fáa tað einfalt og ærligt, og um tú sjálvur ikki livir samsvarandi tí, tú boðar, so er tað týdningarleyst fyri meg, og eg leggi einki í tað!" Sum hatta er lívgandi at hoyra!

Tað, sum hevur alt at siga, er, at Guds orð heilt og fult og allan vegin ígjøgnum er satt. Ver tí trúgvur móti skriftunum.

„... et Ord til Dagen"
*Effie Campbell* umsetti.

# Guds orð

„Sonur mín, gev orðum mínum gætur, vend oyra tínum til talu mína. Lat tey ei víkja frá eygum tínum, varðveit tey innast í hjarta tínum. Tí at tey eru lív fyri teimum, ið finna tey, og heilsubót fyri alt teirra likam." Orðt. 4,20-22. Bíblian er Guds heilaga bók. Í Bíbliuni er tað Gud, sum talar til okkara. Vilt tú, at Gud skal tala til tín? Bíblian er Guds tala til tín.

*e.c.* ums.

---

Fólk leita eftir tryggleika og sannleika. Tey leita eftir álítandi menniskjum, sum hava meir enn bara orð.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á føroyskum, donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74